## Obama leggur trýst á Pakistan

Barrack Obama, forseti, segði í gjárkvøldið, at USA er til reiðar at søkja at málum pakistonsku megin markið millum Pakistan og Afghanistan, men at USA fer ikki at senda hermenn inn á pakistanska jørð. Forsetin leggur tó afturat, at amerikanski herurin fer ikki at leypa á mál í Pakistan, uttan í samráð við pakistanskar myndugleikar. Obama hevur sagt, at hann fer at leggja stóran dent á at beina al-Qaeda burtur, og hann hevur ikki dult fyri, at hann vil hava Pakistan at gera meiri við málið. Eygleiðarar siga tí, at orðini um álop á mál í Pakistan eru ein roynd at herða trýstið á pakistonsku stjórnina.



## Avbyrgja tey fátæku

Myndugleikarnir í brasilska býnum Rio de Janeiro eru farnir undir at stoypa ein 11 kilometrar langan múr , sum skal forða fyri, at tann fátæki parturin av býnum breiðir seg ímóti teimum væl umtóktu ferðamannaplássunum. Millum annað hava myndugleikarnir víst á, at tjóvar eru farnir at gera meiri um seg við tær kendu strendurnar, og at tað kann reka ferðafólk burtur. Ein onnur frágreiðing hjá myndugleikunum er, at múrurin skal verja skógarøkið uttan fyri býin, men fleiri siga, at múrurin fer at økja gjónna millum tey ríku og tey fátæku í býnum.

# Hvørt húsarhald spara upp til 2000 krónur um mánaðin




*Umhvørvisvernd eigur at byrja heima hjá hvørjum einstøkum húski og tað er rættiliga lætt at spara einar 150-2000 krónur um árið, staðfesti hann á landsfundi Sambandsfloksins á Viðareiði í morgun*

**Á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum leygardagin gjørdi Kaj Leo Johannesen nakað burtur úr umhvørvinum og hann heitti á fóllk um at hugsa seg um fyri at spara, tí tað er nakað, sum lønar seg aftur bæði væl og virðiliga**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Við tí tøkni, sum er í dag, kann hvørt húski spara helvtina av rokningini til olju og til Sev.

Tað førdi Kaj Leo Johannesen, løgmaður og formaður Sambandsfloksins fram í formansfrágreiðing síni á landsfundi floksins leygarmorgunin.

Í frágreiðingini kom hann nógv inn á umhvørvið og útlátið av umhvørvisskaðiligum evnum.

Hann vísti á, at eitt er, hvørji tiltøk samfelagið kann gera.

Men hann vísti eisini á, at hvørt einasta húski kann eisini gera sítt til, at bøta um støðuna – og samstundis spara ein hóp av peningi.

Og hann metir at umhvørvisvernd eigur at byrja heima hjá hvørjum einstøkum húski.

Og hansara boðskapur til vanliga føroyingin var at vísa umhugsni á hesum øki.

Hetta ikki bara verjir umhvørvið, men tað er eisini ein rúgva av pengum at spara hjá hvørjum húsarhaldi.

### Kunnu spara 50%

Bara við at ansa betri eftir olju og streym, og við at gera smærri íløgur, ber til at spara eini 50%-60% av oljurokningini og eini 40% av streymrokningi.

- Tað er lætt og krevur ógvuliga lítið av okkum at vera meiri tilvitað um orkunýtsluna. - Og bara við at brúka spariperur, við ikki at brúka óneyðugt heitt vatn og ljós, við at seta klokku á oljufýrið og oljupumpu, sum regulerar nýtsluna eftir oljutørvinum og við ikki at lata elektrisk tól standa á stand by, tá ið tey ikki verða brúkt, ber til hjá hvørjum einasta húsarhaldi at spara einar 1500-2000 krónur um mánaðin í olju og streymi, legði hann afturat.

- Og samstundis verður Co2 útlátið minkað yvir 50%.

Annars er samgongan í ferð við at játta 230 milliónir í ár til orkusparandi tiltøk í sambandi við bygging og tað fer eisini at kasta nógv arbeiði av sær. Harafturat er ætlanin at brúka 400 milliónir til bjálving og alternativa bygging hesi næstu árini.

# Føroysk tryggingarfeløg sleppa nú í harða ka



Skjótt sleppa føroysk tryggingarfeløg at tekna tryggingar

**bæði í Danmark og í Grønlandi og samstundis sleppa donsk og grønlendsk tryggingarfeløg at tekna tryggingar í Føroyum**

*Áhoyrarar á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum leygarmorgunin, hoyrdi Johan Dahl, landsstýrismann, greiða frá ætlanunum um at kollvelta føroyska tryggingarmarknaðin. Her sita frá vinstru Jaspur Vang, Alfred Olsen, Bjørn Kalsø og Rósa Samuelsen*

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at gera allan ríkisfelagsskapin til ein stóran, opnan tryggingarmarknað.

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, fer nú undir samráðingar við danskar myndugleikar um at gera allan ríkisfelagsskapin til ein felags tryggingar marknað.

Tað boðaði hann frá á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum leygarmorgunin.

Hann sigur, at danska stjórin hevur víst vælvild og er sinnað at samráðast við vinnumálaráðið um at gera allan ríkisfelagsskapin til ein tryggingarmarknað.

### Fríari kappingbíligari trygging

Tá ið avtalan er gjørd, fer tað at merkja, at føroysk tryggingarfeløg hava fríar ræsir at stovna deildir í Danmark og í Grønlandi og at tekna tryggingar har.

Samstundis fáa tryggingarfeløg í Danmark og í Grønlandi frítt at stovna deildir í Føroyum og at tekna tryggingar her.